Aðalfundur

Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður leygardagin 24. februar 1996 kl. 10.30 í Norðurlandahúsinum, við hesi dagsskrá:

Gestarøðarar:

Edmund Joensen, løgmaður
Jens Petur Arge,
stjóri í Tryggingarsambandinum
Finn Norman Christensen,
forstjóri í Tinganesi
Hanus Andreassen, rithøvundur

Eftir ein døgurðasteðg verður byrjað aftur kl. 13.00 við hesi dagsskrá:

1. Frásøgn formansins frá farna ári
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar
3. Virkisskrá
4. Lógarbroytingar
5. Møgulig uppskot frá limum og nevnd
6. Ásetan av limagjøldum
7. Val av formanni
8. Val av 2 nevndarlimum og 2 tiltakslimum
9. Val av grannskoðara og tiltakslimi
10. Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi leygardagin 17. februar 1996.

Boðað verður frá, at eitt valevni er til formansvalið á aðalfundinum. Valevnið er:

Jákup Danielsen
Reynsgøta 69
160 Argir

Starvsmannafelagið

Farloyvisskipanin og varaløgmansstarvið:

Nú verða reglurnar endurskoðaðar

Skrivingin og umrøðan av málinum, tá løgmaður fór av landinum, og varaløgmaður ikki visti av, fær nú eitt eftirspæl.

Nú verða skipaðar reglur gjørdar fyri mannagongdina, tá løgmaður fer uttanlands, og annar landsstýrismaður skal virka í hansara stað.

Á tíðindafundinum í Tinganesi týsdagin var eitt skriv handað tíðindafólkunum, har Edmund Joensen, løgmaður m.a. sigur, at "farloyvini ikki eiga at verða tikin sum eitt kommunikatiónsamboð, men sum tað tey eru, nevniliga ein váttan fyri Føroya Gjaldstovu og eitt tryggingarskjal".

Løgmaður heldur eisini, at skipanin við at løgmaður undirskrivar farloyvi er ótíðarhóskandi og fevnir ikki um allar stovnar. Skipanin eigur tí at verða endurskoðað.

Í tíðindaskrivinum stendur annars, at reglur skulu gerast viðvíkjandi fráboðanum millum landsstýrismenn og løgmann. Tað er trupult í dag, sum kunnugt, men verður enn torførari aftaná ólavsøku, tá landsstýrismenn fara at sita meira spjaddir enn í dag.

Hvat tað snýr seg um, skilst, at samstarvið millum landsstýrisfólkini er ein umsitingarligur spurningur, og Edmund Joensen hevur nú biðið forstjóran í Tinganesi um at at endurskoða farloyvisskipanina í sambandi við aðrar umleggingar, sum skulu fara fram.

Ætlanin er at fáa eina skipaða mannagongd um viðurskiftini, tá løgmaður er uttanlands og varaløgmaður skal taka sæti í hansara stað.

Dagny



»DRIVE IN« í Saltangará

Fríggjadagin 19. januar var svartakálk og sera hált. Av hesi orsøk endaði hesin vøruvognurin hjá H. H. Transport í Havn inni í sýnisglugganum hjá Jungmann í Saltangará. Tíbetur hendi ongin fólkaskaði, førarin og hjálparmaður hansara sótu báðir í bygdarbelti

Samstarvið byggir á álit

– Vanliga hevur tað gingið væl við óskrivaðum reglum, men tað kundi eisini verið hent, um mannagongdirnar vóru meira skipaðar, sigur Edmund Joensen

Løgmaður var ikki serliga tíðindafróður, tá tíðindafólkini í Tinganesi týsdagin fregnaðust um hví løgmaður ikki hevði sagt varaløgmanni frá, at hann fór uttanlands.

Málið hevur verið umrøtt í fjølmiðlunum í eina viku, men burtursæð frá at løgmaður, tá hann kom heimaftur, gjørdi viðmerking í útvarpinum, hevur ikki verið gjørligt at fáa Edmundi Joensen í talu.

Við Sosialin sigur løgmaður, at hann var ógvuliga upptikin áðrenn hann fór til Danmarkar. Hann hevði vitjan av hetlendska løgmanninum og embætisfólkum hansara mánadag og týsdag til út móti midnátt báðar dagar, og at hann fylgdi teimum avstað í Vágum mikudagin, áðrenn hann sjálvur fór í flogfarið til Danmarkar.

- Tað var einki óvanligt á ferð og heldur eingi serlig mál á skránni. Landsstýrið visti, at eg fór avstað, men av tí at hetlendska vitjanin fór við so nógvari tíð, og tí Jóannes Eidesgaard ikki var til staðar, stóðust hesar miskiljingar, sigur Edmund Joensen.

Løgmaður heldur kortini, at samstarvið í landsstýrinum er gott, og at tað bert er nøkur fá undantøk at trupulleikar standast.

- Tað kemst m.a. eisini av, at umsitingin hevur so nógv at gera. Tí koma spenningar, sum eru orsøk til at fólk verða ørkymlaði, sigur Edmund Joensen.

Hann heldur, at tað sum áður hava verið óskrivaðar reglur, sum bygga á álit í samstarvi, eiga at verða skipaðar betur.

Tað er í hesum sambandi, at løgmaður nú hevur biðið forstjóran um at gera skipaðar reglur fyri farloyvisskipanini og øðrum reglum um arbeiðsgongd og mannagongd í Tinganesi.

Dagny

BILLUTIR

útvegast til
FLEST ALLAR
BILAR

Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605 Fax. 21666

Kvinnuhúsið

Ráðgevingin hjá Kvinnuhúsinum er opin hvørt hóskvøld frá kl. 19.00–21.00, inngongd hjá KFUM, Oman Pisuvarða 2, ella á tlf. 17200.

Kvinnuhúsið er opið gerandisdagar frá kl. 10.00–16.30. Telefonin, 17200, svarar hvønn dag frá kl. 10.00 fyrrapart til kl. 7.00 á morgni.

TVINGSILSSØLA
Hósdagin
22. februar 1996,
kl. 9.00

verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 147 ǫ, Leirvík, 520 Leirvík (AS 389/95).**

Ognin er eitt grundøki stórt 630 m² smb. tingbók við ástandandi sethúsi í tveimum hæddum, gjørd av timbri og betong og takt við eternit. Kjallari: Óinnrættaður. Stovuhædd: Durur/gongd, køkur/spísistova, stova, hjúnarúm v/ tilhoyrandi wc/brúsu, 2 kømur og wc v/ baðikari.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, adv., Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn, tlf. 11260 (innh. nr. 39959),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur,
tann 30. januar 1996

TVINGSILSSØLA
Hósdagin
22. februar 1996,
kl. 9.30

verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1,100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 109, Norðdepil, 730 Norðdepil (AS 393/95).**

Ognin er eitt grundøki við ástandandi sethúsi í kjallara- og stovuhædd, gjørd av timbur og betong og takt við jarni. Kjallari: Óinnrættaður. Stovuhædd: Durur/gongd, køkur, spísistova/stova, wc, hjúnarúm v/ brúsirúmi og 2 kømur.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Jógvan E. Ellefsen, adv., Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn, tlf. 11260 (innh. nr. 41159),** sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Futarættur,
tann 30. januar 1996